

*Margret Sveinbjørnsdóttir arbeiðir sum bladkvinna á Morgunbladnum. Hon er komin til Føroyar fyri at hoyra, hvat vanligi føroyingurin heldur um eina komandi oljuvinnu. Mynd Kalmar*

*Morgunblaðið setir fokus á føroyska „oljuævintýrið"*

# Íslendingar vilja vita hvat føroyingar halda um oljumálið

JAN MÜLLER

Tosar tú við íslendingar sum eru fluttir til Føroya, halda fleiri teirra, at íslendsku fjølmiðlarnir gera alt ov lítið burtur úr føroysku grannatjóðini. Fyri nú hevur Sosialurin tosað við íslendingar, ið arbeiða í Føroyum, sum leggja dent á at siggja, at tað verður meiri samstarv millum londini. Teir halda, at nettup ein týðandi táttur og fortreyt fyri at menna hetta samstarv, tað verið seg innan vinnulív, handil ella mentan, er nettup ein meira virkin leiklutur hjá fjølmiðlunum.

Onkur íslendingar skal hava gjørt vart við hetta á Morgunblaðnum í Reykjavík, og herfyri vóru tveir av bladmonnunum hjá bladnum í Føroyum og gjørdu eitt serblað um Føroyar. Nú hevur bladið so aftur sent eitt av sínum tíðindafólkum til Føroya.

**Skrivar um føroyska „oljuævintýrið"**

Tað er Margret Sveinbjørnsdóttir, sum hevur starvast sum bladkvinna á Morgunblaðnum í nøkur ár.

– Her hendir so nógv í hesum døgum, og sjálvandi royni eg at fáa greiðu á, hvat tað er, sum hendir í føroyska fiskiídnaðinum í sambandi við Fiskavirking. Men høvuðsuppgáva mín er at skriva um oljuna og tað, sum hendir á hesum økinum.

Margret Sveinbjørnsdóttir sigur við Sosialin, at hon er í ferð við at gera eina røð av greinum um nettup spurningin Føroyar og olja. Fyri íslendska lesaran hjá Morgunblaðnum hevur tað stóran áhuga at fylgja gongdini í Føroyum nú leitað verður eftir olju og gassi og har eitt møguligt framtíðarútlit er fyri, at Føroyar gerast ein oljutjóð. Hetta er sjálvandi nakað, ið hugtekur íslendingar, sum ongantíð hava eygleitt føroyingar og Føroyar sum annað enn fiskimenn og eina fiskivinnutjóð.

Hon hevur longu havt eina grein í Morgunblaðnum, har Martin Heinesen á Oljufyrisitingini greiðir frá.

**Vil sleppa at tosa við føroyingar um oljuna**

– Eg vil fegin koma á tal við vanliga føroyingum og fáa at vita, hvat hann heldur um alt hetta nýggja í samband við oljuleiting o.l. Hvat hugsar hann fyri sær, hvussu heldur hann ein oljuvinna fer at ávirka hann og samfelagið annars?

Margret hevur longu tosað við politikarar, vinnulívsfólk og onnur, sum hava eitthvørt við spurningin at gera. Nú er hon so heppin, at Oljuráðleggingarnevndin júst hevur fund í hesum døgum, so øll tey fólkini, sum arbeiða við oljumálinum eru savnað í Føroyum. At tingmenn so eisini skulu á skúlabonk at verða kunnaðir um oljuna heldur hon verða áhugavert og fer hon eisini at skriva um hetta. Hon vil so eisini sleppa at tosa við onkur føroysk listafólk og vita, hvat tey halda um eina komandi oljuvinnu – hvussu hon kann ávirka samfelagið á negativan hátt.

At boringin í Lopra eisini hevur áhuga fyri íslendingar er ikki so løgið heldur. Tað vóru nevniliga íslendingar, sum stóðu fyri boringini í 1981.

**Íslendingar gera eisini krav uppá øki**

At íslendingar vísa oljuleitingini við Føroyar og marknaðrætuni við bretar ans er heldur ikki heilt uttan orsøk. Íslendingar gera nevniliga sjálvir krav uppá eitt stórt øki sunnan fyri Føroyar. Ein partur av hesum økinum verður eisini mettur áhugaverdur millum oljufeløg.

Margret Sveinbjørnsdóttir er útbúgvin cand. phil. í norðurlendskum máli og bókmentum í Danmark. Síðani hevur hon tikið eitt ár á lærðum háskúla í Ísland innan fjølmiðlaarbeiði.

Hetta er hennara fyrsta veruliga vitjan í Føroyum.

– Síðani eg las bókina um Barbaru havi eg altíð havt eitt inniligt ynski um at koma til Føroya, sigur hon.

Morgunblaðið er størsta blaðið í Íslandi. Tað kemur út seks dagar um vikuna og har starvast 200 fólk. Av teimum eru 70 journalistar og 10 fotografar.

## Leyfi boðin út næsta haust og olíuleit hafin sumarið 1998

Á undanförnum árum hafa erlend olíufyrirtæki unnið að umfangsmiklum rannsóknum á færeyska landgrunninu með olíuvinnslu í huga. Olíuvinnsluleyfi verða boðin út næsta haust og stefnt er að því að eiginlegar boranir hefjist sumarið 1998. **Margrét Sveinbjörnsdóttir** kynnti sér upphaf færeyska olíuævintýrisins.

DANNY TRANSPORT

– tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 19192